
SKÚLABØRNINI

*Í Mikladals skúla ganga hesir sjey næmingarnir – vinstrumegin: Amanda (6. flokkur), Bjørg (4. flokkur), Andrea (2. flokkur), Rannvá (4. flokkur), Gunnvá (4. flokkur), Pætur (4. flokkur) og Georg (1. flokkur) og vikarur teirra, Eyðfinn Hansen. Aftanfyri sæst skúlin*

# Ein skúladagur í bygdini M

**Tekstur: Snorri Brend**
**Myndir: Jens Kristian Vang**

Lítli og hugnaligi bygdarskúlin í Mikladali hýsir 7 næmingum og lærara teirra, sum í løtuni er Eyðfinn Hansen úr Klaksvík.

Her ganga tey í skúla fýra dagar um vikuna, og eru fimta dagin í skúlanum á Ziskatrøð í Klaksvík.

Enn er ógreitt, hvussu verður við skúlanum í Mikladali. Nógv verður tosað um samanleggingar og størri skúlaøki. Í oynni er ein annar skúli, hann á Húsum, men enn er eingin avgerð tikin í hesum sambandi.


TRÍVAST

*– Tað er meiri friðarligt í skúlanum, tí vit eru so fá, siga næmingarnir í Mikladals skúla. Á hesi myndini síggjast Bjørg og Pætur, sum bæði ganga í 4. flokki*


FØROYSKT

*Hesa løtuna var føroyskt á tímatalvuni. Onkur las, onkur skrivaði og onnur loystu uppgávur. Á myndini: Uttast vinstrumegin Pætur; fremst á myndini bróðir hansara, Georg og Andrea, og aftast Amanda*